ÚT AT KOYRA

Accord nr.1

Í kappingini um »International Engine of the Year 2000« bleiv Honda Accord 1,8 VTEC nr.1 í motorstøddunum frá 1,4 til 1,8 litur, fyri gó›a orku, og at vera sparin vi› brennievni.

Kelda: Honda Auto Import A/S

Chrysler t‡skar motorar

Mercedes-Benz, i› nú hevur lei›sluna av DaimlerChrysler bá›umegin Atlantshav, hevur avgjørt at Chrysler bilarnir í framtí›ini skulu hava Mercedes motorar.

Kelda: Motor Magasinet

Fabia station-vognur

Skoda Fabia, i› bleiv ársins bilur í Danmark fyri 2001, kemur nú á markna›in sum station-vognurin, Fabia Combi.

Kelda: Bilen Motor & Sport

Bil og Dekkverksta›urin í Kollfjar›ardali

BILVERKSTA‹UR
Magnus Gunnarsson

Ragnar P. Joensen og Vagnur Johannesen á dekkgoymsluni

Á Statoilstø›ini í Kollfjar›ardali er ein verksta›ur í nor›ara endanum, sum hevur veri› leiga›ur út til ymisk endamál sum hava havt vi› bilar at gera. Eina tí› var Toyota verksta›ur har, Bileftirliti› og FDM hava eisini veri› har, umframt fleiri onnur. Sí›an 1995 hava SP/F Rag-Vag, Bil og Dekkverksta›urin v/ Ragnar P. Joensen og Vagnur Johannesen leiga› bilverksta›in.

Rag-Vag

Rag-Vag er ikki navni› á einum bólki sum spælir til undirhald, men er ein stytting av Ragnar og Vagnur, sum bá›ir eru úr Kollafir›i. Teir gingu í barnaskúla saman og hava bá›ir drúgvar royndir innan bilstarvsgreinina. Ragnar er útlærdur bilsmi›ur, og byrja›i at læra á bilverksta›num á Statoilstø›ini og arbeiddi nógv ár hjá Bilasøluni Norrønu, me›an Vagnur hevur sína útbúgving innan handil.

Stór dekksøla

Á›renn bergholi› millum Signabø og Kalbaksbotn var› tiki› í brúk, fór øll fer›sla til og úr Havnini framvi› stø›ini í Kollfjar›ardali. Enn er tó nógv fer›sla tann vegin, og skjótt er at koyra frá rundkoyringini í Kollafir›i til Statoilstø›ina.

Dagliga arbei›a tríggir mans á verksta›num, har teir skifta olju, dekk og útstoyt, eins og arbeitt ver›ur vi› ró›urgrei›um og bremsum. Eisini hava teir eina stóra dekksølu, har teir selja fleiri sløg av dekkum, umframt at teir umbo›a Hankook dekkini, og selja dekk í heilsølu til bilverkstø› kring landi›.

Selja meiri píkadekk

Hesa árstí›ina hava teir úr at gera vi› at gera vetrardekkini klár. Tá vit spyrja um hvussu b‡ti er millum píkadekk og lamelldekk, siga teir at sølan av píkadekkum liggur um eini 60% av samla›u søluni av vetardekkum. Møguliga kemur ta› av at kundarnir hjá teimum koyra meira millum bygdir, og tí heldur vilja hava píkar undir bilinum. Vi› at geva eina gó›a service hevur Bil og Dekkverksta›urin nógvar fastar kundar sum hava lastbilar og bussar, umframt fleiri fyritøkur. Í fjør fóru teir sum naka› n‡tt at selja Kreidler skootarar.

VW Passat - nú meira elegantur

BILAR
Magnus Gunnarsson

Nú f‡ra ár eftir at núverandi VW Passat kom á markna›in, ver›ur hann naka› broyttur í útsjónd, og meira elegantur at síggja til, vi› n‡ggjum motorum og meira útger›.

Broyttur aftan og framman

Framman hevur Passat fingi› n‡tt design, vi› broyttum kølaragittari vi› krom rammu, dupultum forlyktum vi› klárum glasi. Aftan er designi› eisini broytt, vi› n‡ggjum baklyktum, i› klæ›a væl til bilin. Innan eru fleiri broytingar og meira trygdarútger›.

Størri motorar

Flestu motorarnir hava fingi› meira hestakreftir, eins og fleiri n‡ggir motorar eru á skránni, bæ›i bensin og diesel. Største motorurin er ein V6 vi› 193 hk, i› fæst vi› f‡rahjólstrekkinum "4 MOTION" sum standard. VW Passat ver›ur s‡ndur fram á altjó›a bilaframs‡ningini sum er í Bella Centrinum í hesum døgum. Vit fara at hyggja nærri at Passat'inum tá hann kemur til landi›, og fáa hann royndarkoyrdan.

Framman hevur Passat fingi› n‡tt design, vi› broyttum kølaragittari vi› krom rammu, dupultum forlyktum vi› klárum glasi.

ÚT AT KOYRA

N‡ggjur Corsa
– líkist sær sjálvum uttaná

BILAR
Magnus Gunnarsson

Corsa er ein av best umtóktu Opel bilum. Fyrsti Corsa kom á markna›in í 1983, og framleiddir eru meira enn 9 milliónir bilar sí›an tá. Hesin seinasti er tri›ja ættarli› av Corsa.

Hóast hesin n‡ggi Corsa líkist tí fyrra, er talan um ein heilt n‡ggjan og rúmligari bil

Størri bilur

Hóast hesin n‡ggi Corsa líkist tí fyrra, er talan um ein heilt n‡ggjan og rúmligari bil.

Av tí at tann fyrri Corsa bleiv ein "succes", hava teir ikki vilja broytt útsjóndina ov nógv. Størsta broytingin í útsjóndini er aftan, har baklyktirnar eru á hædd vi› bakrútin, sum á t.d. Ford Focus. Hesin n‡ggi er ein størri og betri bilur, i› er rúmligari, meira ljó›leysur, og hevur sera gó›ar koyrieginleikar.

Nógv trygdarútger ›

Bilurin er gó›ur at sita í, alt virkar væl, instrumentini eru t‡›ulig, og alt er lætt at umgangast. Corsa hevur somu trygdarútger› sum vanliga er í størri bilum, vi› t.d. aktivum nakkapútum, dupultum airbag, sí›uairbag og trygdarbjálkar í hur›unum. Skipanin vi› hur›alásunum er sera trygg, og ringt ver›ur at bróta inn í ein Corsa, i› eisini hevur eina effektiva startsperru.

Easytronic

Umframt manuelt og automatiskt gear, fæst Corsa eisini vi› Easytronic, i› bæ›i er manuelt og automatiskt gear. Vi› Easytronic ber til hjá bilføraranum at skifta gear vi› at koyra undir gearstongina frameftir til hægri gear, og aftureftir til lægri gear, ella hann velur at koyra heilautomatiskt.

Corsa Sport hevur hvít instrument, alu-look panel og gearknøtt

Seks motorstøddir

Íalt eru seks motorar at velja í, f‡ra bensin og tveir diesel, sum allar lúka tey strongu krøvini til dálking í 2005. Bensinmotorarnir eru hesir: 1,0 litur / 58 hk, 1,2 litur / 75 hk, 1,4 litur / 90 hk, 1,8 litur / 125 hk, og dieselmotorarnir eru 1,7 D / 65 hk og 1,7 TD / 75 hk. Corsa frá 1,4 l motorinum og uppeftir hava elektriska servost‡ring sum standard. Bilurin á myndunum er ein 1,4 litur Sport vi› 90 hk. Hann hevur til dømis tokulyktir framman, radio vi› fløguspælara, hvít instrumentir, alu-look panelir og gearknøtt, umframt vanligu standardútger›ina.

Corsa ver›a gjørdir vi› 3 og 5 hur›um, og fáast í útgávunum Family, i› er standard útgávan, Comfort, Sport, Elegance og GSi. Corsa hevur 12 ára garanti móti gjøgnumtering.

Størsta broytingin er aftan, har baklyktirnar eru á hædd vi› bakrútin

Opel Corsa 1,4 Sport

Motorurin	4 syl.16V og 90 hk
0-100 km/t	11,5 sek.
Bensinn‡tsla	13,9 km/l
Dekkstødd	175/65-14
Stødd og vekt	
Longd	381,7 cm
Breidd	164,6 cm
Hædd	144,4 cm
Eginvekt	frá 900 kg (alt eftir motorum, útger› o.a.)
Prísur	kr. 138.000,-
Søluumbo›	P/F Meinhardt Arge Vi› Oyggjarvegin FO-100 Tórshavn Telefon 316161